

*Útsýnið frá brúnni á Emmu Mærsk, sum her er á veg ígjøgnum Suezveitina. Á høgru síðu sæst Egyptaland og vinstru megin er tað Saudiarábia.*

vildi royna at stýra skipinum. Tað kundi eg sjálvandi ikki siga nei til, so eg tók við báðum hondum um rórið. So dreyaði eg tíggju gradir til stýriborð. Bíðaði. Og so tíggju gradir til bakborð. Eg føldi ikki at skipið broytti kós, men tá eg hugdi eftir kjalarvatninum, sá eg, at skipið hevði flutt seg," greiður Sára eldhugað frá.

**Frá Singapor til Ongland**

Fyrsti steðgur á túrinum var í Kina og síðan var lagt at bryggju í Hong Kong.

"Tá vit komu til Hong Kong, haldi eg, at tað gekk upp fyri mær, at hetta ikki bert var ein vanligur túrur hjá einum Mærsk bingjuskipi. Á keiini lá ein reyður leypari, sum var meira enn 150 metrar langur, og skrúðgonga var við einum hornorkestri. Sjálvt um leyparin ikki var til mín, men allir teir fínu gestirnar, sum komu umborð, so livdi eg mitt í verðini," fortelur Sára.

Frá Hong Kong gekk leiðin til Japan og víðari til Malaisia. Og sum nakað serstakt minnist Sára túrin frá Reyðahavinum og í gjøgnum heimsins longstu siglingarveit, Suezveitina. Veitin er millum 300 og 365 metrar breið, so tað er ein størri uppgáva hjá einum risastórum skipi sum Emmu Mærsk at sigla ígjøgnum.

"Tað var ótrúligt at sigla ígjøgnum Suezveitinia. At standa á brúnni og hyggja útyvir veitina, Egyptaland og Saudiarábia. At síggja eina konu reka eitt neyt í Egyptalandi, hon hugsaði óivað ikki um, at heimsins størsta bingjuskip fór framvið. Og hinumegin veitina í Saudiarábia lá ein stór herðmannalega. Tá hugsaði eg við mær sjálvum, tað er gott, eg búgvi í Føroyum."

"Tá vit sigldu ígjøgnum veitina fylgdu tríggir menn í speedbáti okkum, teir skuldu vera klárir at binda skipið til lands um ein sandstormur bráddliga brast á. Tað hendir av og á, men vit sluppu tíbetur undan," greiður hon frá.

Komin út í Miðjarðahavið gekk leiðin gjøgnum Gibraltarsundið og Biscayavíkina. Og næsti steðgur var Flexstowe í Onglandi.

"Skipið bleiv móttikið sum ein drotning. Nógvir smábátar sigldu út ímóti okkum, og bæði CNN og BBC fylgdu skipinum við tyrlum," fortelur Sára.

Frá Onglandi sigldu tey til Holland, og har endaði túrurin hjá Olsen hjúnunum, sum síðan kundu leggja leiðina heim aftur til Føroya.

"Heildaruppliving av túrinum var fantastisk. Tað var ein sovorðin friður, har eg veruliga kundi njóta allar upplivingar. Eg var ikki bundin av nøkrum, eg slapp at njóta dagin sum hann var," sigur Sára.

At túrurin var nakað sjálvsamt sæst aftur á talinum av vitjandi umborð. 75 tíðindafólk og 1120 gestir sóu stásiliga skipið á fyrsta túrinum.

"Tað var ein serstøk uppliving í sær sjálvum at vera umborð, og nakað serligt at hava fingið høvið at sigla júst við Emmu Mærsk. At fylgja við hennara jomfrúferð. Tað er øðrvísi og stuttligt at ferðast á henda hátt. Eg vil heilt avgjørt




*Reyði leyparin í Hong Kong var meira enn 150 metrar langur*

Sosialurin